# Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 13. januar 2022
Mál nr.: 22/01010
Málsviðgjørt: AP
Ummælisfreist:
Eftirkannað: Lógartænastan dagfestir

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum**
(Broyta ásetingar um meting av upprunavirðinum og útvegan av skjalprógvi)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum, sum broytt við løgtingslóg nr. 12 frá 26. februar 2010, løgtingslóg nr. 160 frá 20. desember 2013, løgtingslóg nr. 57 frá 18. mai 2015, løgtingslóg nr. 142 frá 18 desember 2015, løgtingslóg nr. 155 frá 12. desember 2018, løgtingslóg nr. 36 frá 9. apríl 2019, løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2020, løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, løgtingslóg nr. 100 frá 25. juni 2020 og løgtingslóg nr. 18 frá 24. februar 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 22 verður stk. 3 strikað.

**2.** § 22, stk. 4, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
“Kunnu teir í stk. 2 nevndu persónar og feløg ikki útvega skjalprógv fyri upprunavirðinum, kann Akstovan úr egnari akfarsskrá ímóti gjaldi útvega skjalprógv samsvarandi stk. 2, og kann samstundis við støði í upplýsingunum úr akfarsskránni í serligum førum gera eina meting av upprunavirðinum sbrt. stk. 2.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Fíggjarmálaráðið legði lógaruppskot fyri Løgtingið í desember í 2020, LM-066/2020, har roynt varð at fáa undirtøku fyri at fara frá upprunavirðið til útveganarvirðið, men hesum tók Løgtingið ikki undir við. Tí verður nú skotið upp at broyta ásetingina um, at Akstovan kann útvega skjalprógv úr egnari akfarsskrá og í serligum førum gera eina meting av upprunavirðinum, um ikki innflytarin av einum brúktum motorakfari sjálvur er førur fyri at útvega skjalprógvið, sum hann hevur skyldu til, sbrt. § 22, stk. 2.

Galdandi lóg áleggur eisini Akstovuni í § 22, stk. 4 ímóti gjaldi at útvega skjalprógv fyri upprunavirðinum. Í einum kærumáli nr. 20/00244 heimvísti Skatta- og avgjaldskærunevndin tann 30. juni 2021 eitt mál til nýggja viðgerð og álegði Akstovuni at royna at útvega skjalprógv uppá upprunavirðið á akfarinum frá framleiðaranum í Týsklandi ella innflytaranum í Svøríki.
Í einum øðrum bilmáli, royndi Akstovan í mars/apríl 2021 at spyrja innflytara í Svøríki og bilhandlara í Danmark um upprunavirðið á einum innfluttum brúktum bili. Svarið var stutt, at tey tíverri ikki kundu hjálpa Akstovuni við hesum fyrispurningi.

Ætlanin við ásetingini í § 22, stk. 4 var ongantíð at áleggja Akstovuni at fara uttanlands at útvega viðskiftafólki skjalprógv uppá upprunavirðið á innfluttum brúktum motorakførum. Í staðin var tað í § 3 í kunngerð nr. 112 frá 9. oktober 2015 um skjøl og upplýsingar, sum skjalprógva upprunavirðið á innfluttum brúktum motorakfari ásett, at góðkend umboð sbrt. § 2 í kunngerðini, eru søluumboð sum hava sáttmála við framleiðaran ella høvuðsumboð av viðkomandi merki, ella góðkendur serviceverkstaður, sum hevur garantiskyldur og serviceskyldur fyri viðkomandi merki mótvegis framleiðaranum ella einum av framleiðaranum góðkendum høvuðsumboði.

Ætlanin var sostatt bert, at Akstovan skuldi spyrja seg fyri hjá søluumboði ella serviceverkstaði her á landi um upprunavirðið á einum innfluttum brúktum motorakfari. Í verki hevur hetta víst seg ikki at bera til, tí umboðini vilja ikki geva hesar upplýsingar, tí tey óttast fyri at upplýsingarnar verða nýttir kappingaravlagandi.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lóg áleggur Akstovuni í § 22, stk. 3 í serligum førum, at gera eina meting av upprunavirðinum á einum innfluttum brúktum motorakfari. Akstovan hevur ikki førleika ella vitan til ítøkiliga at meta um upprunavirðið á ymiskum merkjum og modellum á innfluttum brúktum bilum og hevur heldur ikki atgongd til hesar upplýsingar. Tí verður stovnurin settur í eina ómøguliga uppgávu, um viðskiftafólk heldur uppá, at Akstovan skal gera eina ítøkiliga meting av upprunavirðinum.

Galdandi lóg áleggur Akstovuni í § 22, stk. 4 ímóti gjaldi at útvega skjalprógv fyri upprunavirðinum. Í einum kærumáli nr. 20/00244 heimvísti Skatta- og avgjaldskærunevndin tann 30. juni 2021 eitt mál til nýggja viðgerð og álegði Akstovuni at royna at útvega skjalprógv uppá upprunavirðið á akfarinum frá framleiðaranum í Týsklandi ella innflytaranum í Svøríki.

Í einum øðrum bilmáli, royndi Akstovan í mars/apríl at spyrja innflytara í Svøríki og bilhandlara í Danmark um upprunavirðið á einum innfluttum brúktum bili. Svarið var stutt, at tey tíverri ikki kundu hjálpa Akstovuni við hesum fyrispurningi.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**

Við avgerð í kærumáli frá Skatta- og avgjaldskærunevndini tann 30. juni 2021 hevur Akstovan fingið ein nýggjan leiklut, um at útvega upplýsingar frá útlendskum importørum og bilframleiðarum, sum Akstovan onki tilknýti hevur til, samstundis sum Akstovan eisini er eftirlits- og avgerðarmyndugleiki á økinum.
Akstovan hevur ikki skyldu til at fara út um egnar skráir at finna fram upplýsingar um upprunaprísir á einstøku akførunum, og tí verður hetta nú broytt.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Staðfest verður, at Akstovan úr egnari akfarsskrá ímóti gjaldi kann útvega skjalprógv um upprunavirðið samsvarandi § 22, stk. 2, um so er, at eigarin ikki sjálvur er førur fyri at útvega slíkt skjalprógv. Samstundis kann Akstovan við støði í upplýsingunum úr akfarsskránni í serligum førum gera eina meting av upprunavirðinum, sbrt. § 22, stk. 2.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri Akstovuna. Broytingarnar fara at gera tað lættari hjá Akstovuni at umsita økið.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur hvørki fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Ongir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Ongir tvørgangandi millumtjóðasáttmálar eru.

### 2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru.

### 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Ongin revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv eru í lógaruppskotinum

### 2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

### 2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

### 2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

### 2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

### 2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

**Til nr. 1 - § 22, stk. 3:**
Skotið verður upp, at strikað stk. 3, tí at Akstovan hevur ikki førleika ella vitan til ítøkiliga at meta um upprunavirðið á ymiskum merkjum og modellum á innfluttum brúktum bilum og hevur heldur ikki atgongd til hesar upplýsingar.

**Til nr. 2 - § 22, stk. 4, 1. pkt.:**
Skotið verður upp, at umorðað stk. 4, 1. pkt. so, at Akstovan úr egnari akfarsskrá ímóti gjaldi kann útvega skjalprógv um upprunavirðið samsvarandi stk. 2, og kann samstundis við støði í upplýsingunum úr akfarsskránni í serligum førum gera eina meting av upprunavirðinum sbrt. stk. 2. Hetta seinna kann vera, um innflutti brúkti bilurin ikki heilt samsvarar við bilin í akfarsskránni.

**Til § 2**
Talan er um gildiskomu. Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir hon er kunngjørd.

Fíggjarmálaráðið, 13. januar 2022.

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: